Nýggja pantskipanin

19. apríl 2024



Endamálið við nýggjari pantskipan

- At gera tað lættari hjá brúkaranum at sleppa av við øll síni einnýtis- og endurnýtsluíløt á einum stað
- At fáa so nógv einnýtis- og endurnýtsluíløt inn aftur sum gjørligt
- At gera tað lættari at leggja íløt afturat pantskipanina, tá ið tørvur er á tí (heimild hjá landsstýrisfólki at áseta í kunngerð)



Fyrimunir við nýggju pantskipanini

- Sundurskiljingaruppgávan hjá handlunum minkar munandi og minni umsiting krevst av handlunum
- Loysnin leggur pantskipanina í Føroyum í fastar og skipaðar karmar, og setir brúkaran og umhvørvið í fremstu rað



Hví skal IRF vera pantumsitari?

- IRF móttekur tað mesta av pantíløtum til endurvinningar í dag
- IRF hevur vitanina og tøknina til innsavning og útflutning, og hevur samband við veitarar í útlandinum
- At tryggja innsavnan og viðgerð av pantíløtum er ein partur av tí grønu umstillingini, sum nýggja burturkastkunngerðin leggur upp til (meira endurvinning og endurnýtslu)
- Handilsvinnufelagið hevur roynt at stovna ein pantumsitara uttan eydnu
- IRF er ein interkommunalur felagsskapur sum bæði Handilsvinnufelagið og landið góðkennir sum pantumsitara



IRF

Kanningararbeiði í 2023

Arbeiðssetningur: Hvussu skal nýggja føroyska pantskipanin skipast?

- Lýsing av núverandi pantskipan
- Vitja Dansk Retursystem og Infinitum í Norra
- Hugt eftir íslendsku skipanini við móttøkustøðum

Niðurstøða:

- Handilsvinnufelagið ynskir ikki at flyta móttøkuskyldina frá handlunum
- Eina sjálvfíggjandi pantskipan sum skal vera effektiv og so bílig sum møgulig
- Ger eina einkla prísskipan og einklar flutningsloysnir (posar, kassar o.a.) fyri at minka um umsiting
- Hava eina góða/títta innsavning
- Hava telduskipanir, sum handfara skrásetingar (innflytarar, framleiðarar, íløt) og pengarensl (inngjald pant- og rakstrargjald, útgjald pant)

IRF




Íløt út á marknaðin

- Hvørji íløt eru áløgd pant
- Hvør, nær og hvussu skal pantgjald og rakstrargjald gjaldast
- Rakstrargjald




Tóm íløt inn í pantskipanina

- Móttøkuskylda



Grundarlag fyri pantútgjald

- Nær verður pantvirðið útgoldið frá IRF Pant



Mannagongdir


- Kundi <-> Sølustað
- Sølustað <-> IRF

Hvørji íløt verða áløgd pant?

- Pantskipanin fevnir um einnýtisíløt og endurnýtsluíløt úr **metali, plasti og glasi**, sum rúma minni enn 20 litrar (og ikki innihalda mjólkaúrdráttir):
  - Øl, vatn, mineralvatn, sodavatn, orkudrykkir, saft, o.a.
  - Drykkjuvørur, har etanol er blandað uppí, og drykkjuvørur framleiddar av rúsdrekka og/ella etanol (t.d. vín, vermouth, cider, rúsdrekka, umframt aðrar geraðar drykkjuvørur, so sum perucider, mjød, saké o.a.)
  - Óblandað saft ella annað konsentrat til leskidrykkir
- Pantskipanin fevnir ***ikki*** um hesi íløt:
  - Kaggar
  - Plastdunkar, sum rúma meira enn 10 litrar til vatn, kelduvatn og mineralvatn uttan kolsýru
  - Íløt, sum rúma meira enn 4,9 litrar til óblandaða saft ella annað konsentrat til leskidrykkir

IRF

Pantgjald og rakstrargjald



Afturbering av pantgjaldi og rakstrargjaldi

- Tað er møguligt at fáa afturbering av pantgjaldi og rakstrargjaldi fyri íløt, sum fara úr føroyska marknaðinum, har tað er ósannlíkt at íløtini koma inn aftur í pantskipanina
- Skjalprógv skal latast til IRF Pant, sum avger, um umbønin verður góðkend.



Hvat er rakstrargjald?

Pantskipanin skal vera sjálvfíggjandi – ein null-loysn.


Hetta merkir, at inntøkur skulu fíggja rakstur og íløgur.

Útreiðslur hjá IRF Pant

- Umsiting
- Viðlíkahald
- Íløgur
- Leiga
- Flutningur
- Kunningarátøk
- Grannskoðan o.a

Inntøkur hjá IRF Pant

- Rakstrargjald (60% - 90%)
- Søla av endurnýtslutilfari (0% - 10%)
- Pant, sum ikki er útgoldið (0% - 40%)



Áseting av rakstrargjaldi

Útrokning rakstrargjald

(mars mánað)

Tá ið roknskaparárið er uppgjørt, verður rakstrargjald útroknað. Ársfrágreiðing og rakstrarætlan fyri tíðarskeiðið fram til næstu áseting verður gjørd.

Rakstrargjald til ummælis

(apríl mánað)

Skrásettir innflytarar og skrásettir framleiðarar fáa frágreiðing, rakstrarætlan og uppskot um rakstrargjald til ummælis. Ummælisfreistin er minst ein mánaður.

Góðkenning Landstýrisfólkið

(byrjan av mai)

Rakstrargjaldið verður góðkent av Landstýrisfólkinum.

Rakstrargjald kemur í gildi

(1. juni)

IRF Pant boðar skrásettum framleiðarum, skrásettum innflytarum og TAKS frá minst 14 dagar áðrenn rakstrargjaldið kemur í gildi.

IRF

Rakstrargjald – Ár 1

Fortreytir:

- 15 mió íløt
- Returprocent 92 % (tvs. 1,2 mió íløt koma ikki inn aftur)

Rakstrargjaldið ár 1 = 0,50 kr pr. ílat

Rakstrarætlan (mió kr)	Ár 1
Inntøkur	11
Rakstrarútreiðslur	7,4
Kapitalútreiðslur	3,6
Úrslit	-



Móttøkuskylda

Sølustøð, sum selja íløt, ið eru fevnd av pantskipanini, hava móttøku-skyldu at taka ímóti øllum íløtum, sum eru fevnd av pantskipanini.



Móttøkuskylda - Undantøk

- Matstovur, barrir, kaffistovur, pylsuvognar og aðrir matvognar/bilar
- Amboðshandlar, timburhandlar og líknandi (sølustøð, sum vanliga ikki selja matvørur, og einans selja nakrar heilt fáar vørur fevndar av pantskipanini)
- Bakarí, sum í høvuðsheitum ikki selja annað enn bakstur
- Sølubúðir í sambandi við bý- og bygdarstevnur, ítróttartiltøk, tónleikatiltøk, sølustevnur og líknandi

Sølustøð hjá bryggjaríum hava einans skyldu at taka ímóti íløtum, sum tey sjálvi selja

Móttøkuskyldan kann flytast

Sølustað

Móttøkutíðir:

Skulu taka ímóti íløtum minst 8 tímar um vikuna og minst ein tíma í senn.

Móttøkustað

(flyta móttøkuskyldu til annað sølustað)

Krøv:

Umsókn sendast til IRF Pant, sum ásetur treytir fyri góðkenning av samstarvi, staðseting, atkomu, hølisviðurskifti. Landstýrisfólkið góðkennir.

Móttøkutíðir:

Minst 30 tímar um vikuna.

Móttøkustað

(Uttan at vera eitt sølustað)


Krøv:

Umsókn sendast til IRF Pant, sum ásetur treytir fyri góðkenning av samstarvi, staðseting, atkomu, hølisviðurskifti. Landstýrisfólkið góðkennir.

Móttøkutíðir:

Minst 30 tímar um vikuna.


Rensl – Frá kunda til IRF Pant



Pantíløt: skilt og pressað saman hjá IRF Pant

1

Kundi fær útgoldið pant



2

Fylla posar



3

Avheinting IRF Pant



4


Uppteljing pant



Skiljiskipan
hjá IRF Pant

5

Uppgerð og avrokning



6


Til endurvinning ella endurnýtslu



Pantíløt: skilt og pressað saman hjá sølustaði

1

Kundi fær útgoldið pant



2


Uppteljing pant hjá sølustað



Fløskuautomat við komprimering

3

Fylla posar




4

Avheinting IRF Pant



5

Uppgerð og avrokning



6

Til endurvinning ella endurnýtslu



Broytingar

- Fleiri íløt fevnd av pantskipanini
- Framyvir er tað IRF Pant, sum er pantumsitari

Kundi

- ✓ Sleppur av við øll íløt á einum stað

Sølustøð


- ✓ Skulu móttaka øll íløt fevnd av pantskipanini
- ✓ Íløt verða býtt í tilfar og ikki vøruslag
- ✓ Posar vera avheintaðir av IRF Pant
- ✓ Pantvirðið verður útgoldið av IRF Pant

Framleiðari/Innflytari

- ✓ Øll pantskyldug íløt skulu skrásetast, áðrenn tey fara út á marknaðin
- ✓ Gjalda pantvirði og rakstrargjald pr. ílat
- ✓ Eru ikki pantumsitarar


Tíðarlinja

Skiftistíð



Í skiftistíðini (1. juni 2025 – 1. okt 2025) kann útgjaldið til sølustøð vera seinkað (treytað av gjaldførinum í skipanini)

Tíðarætlan



- Bygging og gera høll klára
- Bíleggja maskinur v.m.
- Gera skipanir klárar (programmering v.m.)
- Starvsfólkasetanir
- Kortleggja sølustøðir
- Fyrireika innsavningina
- Royndarkoyra
- Kunning og samskifti
- Skrásetingar (íløt, framleiðarar, innflytarar, sølustøðir)

Takk fyri

IRF